**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1602**
**Tíðarskeið 10/2-17/2-2016**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Regin Kristiansen, Mourits M. Joensen.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum er at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar. Túrurin er ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum, og er partur av NACLIM verkætlanini. Eisini skuldu vit royna at lesa data úr trimum hitamátarum, sum liggja á botni norðan og vestanfyri. Eisini skuldu vit leggja ein ADCP streymmátara út á skurði S.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, Seabird-CTD25, WP2 glúpur, útgerð at lesa hitamátara akkoustiskt og ein ADCP-streymmátari.

**Um túrin:** Vit fóru út mikudagin 10/2 á miðnátt.
Siglt varð vesturum, har vit byrjaðu at taka standardskurð V út á Føroyabanka. Vit tóku fimm støðir eftir skurðinum, men á tí sættu støðini slitnaði veirurin, so at vit mistu CTD-ina. Vit royndu at dreggja, men uttan úrslit. Vit sigldu so vestur á støð V3, har vit lósu data úr einum hitamátara, sum liggur í eini rammu á botni. Hetta gekk væl, vit fingu tey data, vit skuldu hava.
Avgjørt var so at fara á Havnina eftir eini aðrari CTD (Seabird25).
Vit komu á Havnina kl. 13:30.

Vit fóru av Havnini aftur 11/2 kl. 16:00.
Vit sigldu eystur á støð N1 og tóku skurð N norðureftir. Vit tóku støðirnar norður á N10 (63°50N-6°05V). Á veg norður lósu vit data úr einum hitamátara á N3 (62°40N-6°05V), hetta gekk væl. Vit royndu eisini at lesa data úr einum mátara afturat, á positión 62°47,7N 6°04,9V, men har eydnaðist ikki at fáa samband, hóast vit royndu fleiri ferðir.
Frá støð N10 sigldu vit suður á S14 og tóku hendan skurðin inn á S1 á Munkagrunninum. Vit settu eisini ein streymmátara út á pos. 60°48,9N-5°22,3V. Hetta gekk væl.
Frá støð S1 sigldu vit út á Føroyabanka, har vit tóku støðirnar frá V9 og inn á V1.
Tá liðugt var, tóku vit eitt tóv vestanfyri Skúvoy, tí Petur Steingrund skuldi hava nakrar fiskar til magakanningar.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 5 støðir. Við Seabird25 CTD-ini tóku vit 30 støðir. WP2 glúpur varð tikin á 31 støðum.
Data vórðu lisin úr tveimum hitamátarum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvar vóru bert tiknir á einari støð. Teir verða lisnir í vár.
Saltprøvar vórðu ikki tiknir við Seabird-CTD25.

**Viðmerkingar:** Av tí at Seabird-CTD25 verður lorað spakuligari enn Seabird CTD-in, vórðu færri støðir tiknar enn vanligt. Skurðirnir E, R og M vórðu ikki tiknir. Á skurðunum N, S og V vórðu ikki allar støðirnar tiknar.

17-02-2016

Regin Kristiansen




Støðir á túri 1602